## Hleb ávegis til Barcelona

Hvítarussin í Arsenal, Alexander Hleb, heldur eftir øllum at døma ikki fram í enska høvuðsstaðnum. Miðvallarin hevur seinastu dagarnir verið í samráðingum við Barcelona, og sum helst hevur við sær, at hann spælur á Nou Camp í komandi kappingarári. 27 ára gamli Alexander Hleb skifti til Arsenal í 2005, og hetta seinasta árið hevur hann torført við at vunnið sær pláss í byrjunaruppstillingini.



## Vatnhamar venur við EB/Streymi

Dimmalætting skrivaði í gjár, at Tróndur Vatnhamar, sum í farnu viku takkaði fyri seg í Havnar Bóltefelag, venur við EB/Streymi í løtuni. Málverjin sigur við blaðið, at hann hjálpir liðnum í fyrireikingunum til stórdystin móti Manchester City hósdagin. Vatnhamar vil einki siga, um hann í framtíðini verður knýttur fast at felagnum. Tróndur Vatnhamar er 28 ára gamal og skifti til HB úr B36 í 2005.

Billy Meredith 1874-1958:

# Fyrsta stjørnan hjá Manchester City og United

**Í ár eru liðin 50 ár síðani fyrsta veruliga stjørnan hjá bæði Manchester City og Manchester United, walisiski Billy Meredith, doyði**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*




*Billy Meredith byrjaði at spæla fótbólt í Manchester City 100 ár áðrenn samanleggingin millum EB og Streym gjørdist veruleiki*
*Mynd: Polfoto*

Tað kann ikki umgangast, at søgan hjá tveimum stórfeløgum, sum hava heimstað í sama býi, tíðum verður samantvinnað og at tað kemur fyri, at spælarar royna eydnuna í bæði Manchester City og Manchester United. Kendastu dømini frá nýggjari tíð eru skotin Denis Law, og danski málmanssrisin, Peter Schmeichel. Venjaralegendan hjá Manchester United, Matt Busby spældi eisini fyri Manchester City í sínum ungu døgum. Men fyrsta veruliga stjørnan hjá bæði Manchester City og Manchester United var walisiski Billy Meredith.

### Kolanámsarbeiðari

William "Billy" Meredith varð føddur í Chirk í Black Park í Wales tann 30. juli í 1874. Tey fyrstu fótbóltsárini spældi Meredith amatørfótbólt í feløgunum Chirk og Northwich Victoria. Men fyri at vinna til lívsins uppihald, arbeiddi hann í einum kolanámi, har hann millum annað ansaði teimum smáu arbeiðsrossunum, sum vóru nýtt í kolanámunum. Mong føroysk ross endaðu sínar dagar í einum bretskum kolanámi.

Umboð fyri Manchester City sóu eitt stórt potentiali í tí unga Billy Meredith, og í oktober í 1894 fekk hann sáttmáli við felagið. Longu sama mánað fekk Meredith sína debut ímóti Newcastle, ein dystur sum Manchester City tapti 5-4.

Longu næstu vikuna tók Meredith fyrstu fetini, til at gerast ein legenda í Manchester. Tá Manchester City spældi ímóti Newton Heath – sum í 1902 broytti navn til Manchester United – skoraði hann tvey mál. Hetta var fyrsti ligadysturin millum feløgini bæði.

Meredith gjørdist nógv avhildin av áskoðarafjøldini hjá Manchester City. Hann var ein skjótur spælari, sum fóru spelandi oman gjøgnum vøllin við bóltinum. Kortini dámdi honum so væl at arbeiða í kolanáminum, at tað gekk ein tíð, áðrenn leiðslan í Manchester City fekk yvirtalað hann at fokusera fult og heilt uppá yrkisfótbóltin.

City ferðaðist millum næstbestu og bestu deildina, og eydnaðist tað ongantíð Meredith at vinna meistaraheitið í bestu ensku fótbóltsdeildini við City. Kortini var hann við til at vinna meistaraskapið í næstbestu deildini í bæði 1899 og 1903.

### Vinnur FA Cup

Men í 1904 vann hann sín størsta sigur við Manchester City. City kom í FA Cup finaluna hetta árið. Dysturin var spældur á Crystal Palace, sum tá á døgum var navnið á kendasta leikvøllinum í London. Mótstøðuliðið var Bolton Wanderers. Bolton er grannabýur hjá Manchester, so talan var veruliga um eina grannauppgerð. 61.400 áskoðarar sóu Billy Meredith skora einasta málið í dystinum. Bolton-spælarnir vóru ógvuliga harmir um málið, tí teir meintu, at Meredith var rangstaddur tá hann fekk sendingina frá Livingstone, sum førdi til málið, men dómarin var ósamdur og læt málið standa.

Tað var ein ovurfegin liðskipari, Billy Meredith, sum tók ímóti steypinum. Hann var sagdur at verða besti spælarin í liguni, men hevði einki vunnið fyrr enn hendan dagin hann, sum 30 ára gamal gjørdist steypavinnari við Manchester City.

### Ákærdur fyri mutur

Men nú kom ein hørð tíð í lívinum hjá Meredith. Saman við øðrum City-spælarum, varð hann ákærdur fyri at hava mutrað Aston Villa spælaran Alec Leake at tapa ein dyst við vilja. Ákæran ljóðaði uppá, at Alec Leake hevði fingið bjóða 10 pund frá Billy Meredith fyri at lata seg í einum dysti ímóti Manchester City í kappingarárinum 1904-1905. Talan var um ein avgerandi dyst, sum Manchester City mátti vinna fyri at gerast enskir meistarar í bestu deildini. Enska FA fann Meredith sekan í ákærunum, og hóast hann var ein áskoðaramagnetur, so fekk hann eitt leikbann á 18 mánaðir. Manchester City gjørdi einki fyri at hjálpa Meredith og liðfeløgunum. Meredith gjørdi ikki mætari enn, at hann almannakunngjørdi, at Manchester City hevði framt ólógligar útgjaldingar til sínar spælarar. Hetta førdi við sær, at øll leiðslan hjá City fekk bann fyri lívið at arbeiða innan fótbólt. Felagið varð tvungið at seljaallarsínaryrkisleikarar, og mátti ítróttarliga byrja av nýggjum.

### Til Manchester United

Í oktober 1906 skrivaði Billy Meredith saman við trimum øðrum City-spælarum, sum vóru raktir av muturgøluni undir ein sáttmála við Manchester United. Hann slapp kortini ikki at spæla fyrr enn nýggjársdag 1907, tá leikbannið hjá

*Framhald á síðu 20*